# BankNordik broytir treytirnar á privatum innlánum

BANK**NORDIK**

**Rentan á innláni hjá privatkundum verður broytt, og samstundis verður upphæddin, sum er undantikin negativari rentu, eisini broytt. Broytingarnar verða gjørdar orsakað av handilsligum ávum.**

Frá **1. januar 2021** verður rentan á innláni hjá privatkundum broytt frá -0,75% til -0,60%. Innistandandi upphæddin, sum er undantikin negativari rentu, verður samstundis broytt frá 500.000 kr. til 250.000 kr.

Til ber at hava tríggjar vannligar innlánskontur uttan at gjalda negativa rentu, um upphæddin á kontunum ikki fer uppum ávikavist 250.000 kr, 50.000 kr. og 50.000 kr. Fer upphæddin á hesum kontum uppum ásettu mørkini, skal kundin gjalda negativa rentu á -0,60% av tí upphædd, sum fer uppum markið.

Um kundar hava fleiri enn tríggjar vanligar innlánskontur, verður negativ renta goldin av hesum kontum.

1. januar 2021 verður rentan á pensjónskontum eisini broytt frá -0,75% til -0,60%, og hetta er galdandi frá fyrstu krónu.

**Børn og ung undantikin**
Børn og ung undir 29 ár eru undantikin negativum rentum, og broytingarnar, sum eru nevndar omanfyri, eru sostatt ikki galdandi fyri kundar undir 29 ár.

**Broytingarnar verða eisini at síggja á www.banknordik.fo/prisir, tá ið tær fáa gildi.**

**banknordik.fo**